# Laða kirkjugarðin uppaftur

Gamli kirkjugarðurin í Skálavík (myndin) fór illani av ódnini ið rakti bygdina so meint fyrr í ár, men nú verður garðurin laðaður uppaftur, skrivar heimasíðan bkv.fo. Havódnin skolaði nógv grót burtur av garðinum og í havið. Nú verður nýtt grót fingið til vega, við tað at Jens Pauli Dam úr Havn í løtuni laðar kirkjugarðin aftur.



# Kom Við á Sand

Leygardagin í næstu viku skipar B71 fyri einum serstakum tiltaki, ið tey nevna KomVið. Stevnuøkið letur upp kl. 14, tá harmonikuspælarar og klovnar fara at undirhalda. Kl. 16 fer ein fallskjólshoppari at vísa síni kynstur, og síðani verður tónleikur á skránni, - við ungum gospelgentum úr Skopun, Fríðbjørg Jensen, Tey á Kamarinum, Sámali Ravnsfjall, GrassLandParkingSpace og Týr. Kl. 23 verður stórur føroyskur dansiringur, sum dansifeløgini í oynni skipa fyri, áðrenn dansur verður í tjaldinum.



*Klaksvíkar Hornorkestur eigur sjálvsagt ein týðandi leiklut í søguni um Klaksvíkina*

sangir og tættir, sum kanska ikki hava sæð dagsins ljós øll hesi árini. Nú sita vit so og meta um teir yvirhøvur tola dagsins ljós, flennir Rudolf Joensen heldur loyndarfullur.

## Multietniskur dansur

Umframt søguligar hendingar goymir Gloymda Grýtan eina ørgrynnu av smásøgum, sum meir lýsa ein ávísan tíðaranda, ella, sum, Rudolf Joensen sigur: søgur um mátan, vit hava livað her norðuri.

Sambært formanninum í sjónleikarafelagnum hava eitt nú lívligu dansikvøldini í Klaksvík neyvan verið meir multietnisk enn í 1950 og 60 unum. Í øllum førum høvdu mannfólkini í Klaksvík so harða kapping frá norðmonnum, eingilskmonnum og donskum marinarum, at nógvir ivaleyst minnast tað enn.

Longur upp í tíðini síggja vit, hvat tað gjørdi við klaksvíkingar, tá sjónvarpið gjørdi sína innrás.

- Tað var ikki so, tí fólk mistu jú svøvnin av JR og hansara skálkabrøgdum í Dallas, ella tey gingu og vóru púra býtt í onkari danskari Grand Prix stjørnu, flennir Rudolf Joensen.

## Full upp undir lok

Til at halda skil á øllum søgunum og leikararnum, hevur Klaksvíkar Sjónleikarafelag fingið Jákup Veyhe at leikstjórna. Eitt sera skilagott hugskot, heldur Rudolf Joensen, tí umframt at vera sera dugnaligur, kann havnamaðurin tryggja, at alt ikki blívur ov innforstaðið og lokalt.

Við eini fjaldari rødd, sum í stuttum sigur frá, hvat gongur fyri seg, kunnu eisini tey ungu fylgja við uttan trupulleikar.

Ikki tí - Gloymda Grýtan er full upp undir lok av hendingum, so bæði Norðoyatunnilin og Summarfestivalurin eru sloppin upp í part.

Hóast umstøðurnar at venja ikki eru tær allarbestu á gomlu brandstøðini, ber Rudolf Joensen ongan ótta fyri, at alt ikki fer at spæla væl av. Umframt Jákup Veyhe hava tey nevniliga fingið íslendska Árna Baldvinsson at taka sær av ljósinum, meðan tónleikurin er í bestu hondum hjá Magna Husgaard.

## Luksustrupulleiki

Ongin søga um Klaksvík uttan tónleik, og Gloymda Grýtan gloymir sjálvsagt ikki at minna á, at ein týðandi partur av besta tónleikinum í Føroyum hevur sín uppruna í Klaksvík.

Og nógv bendir á, at tónleikararnir í Husgaards kapel hava havt ein luksustrupulleika, tá teir skuldu velja 10 klaksvíksløg út til eina sirpu, sum er partur av kabarettini.

Vit byrjaðu við at velja eini 20 løg frá, ikki tí tey ikki vóru góð, men tí tey ikki hóskaðu inn í takt og rytmur. Men sjálvt um vit vóru freistaðir at velja nógv fleiri løg, haldi eg, at hesi 10 umboða væl nógva tónleikin, sum klaksvíkingar hava gjørt, sigur Hallur Joensen, sum syngur og spælir gittar í Husgaards kapel.

Teir sum manna bólkin eru annars: Magni Husgaard, kapelmeistari, Hans Hjalti Skaale, sang, Hallur Joensen, sang og gittar, Jens Pauli Joensen, trummur, Jógvan Fróðin Baldvinsson, bass, Rudolf Joensen, sang og Mikkjal Hvannastein, el-gittar.



*Ongin søga um Klaksvík uttan tónleik. Her eru tað Rudolf Joensen, Hallur Joensen og Hans Hjalti Skaale, sum legga rødd til ein av mongu slagararnum úr Klaksvík*



*»Lat okkum bara siga, at vit hyggja at okkum sjálvum út frá einum rættiliga ósjálvshátíðarligum vinkli«, sigur formaðurin í Klaksvíkar Sjónleikarafelag, Rudolf Joensen, um afturlítandi føðingardagskabarettina Gloymd Grýta á Brandstøðini*

**Gloymd Grýta á Brandstøðini!**
verður sýnd Sjómannadagin 16. august á nýggju brandstøðini kl. 12, kl. 14, kl. 16 og kl. 18.